# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Realskúlaflokkur hittist í 1981

Mynd frá realskúlaframsýningini sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er ein realskúlaflokkur frá 1951, sum er komin saman til 30 ára hald á Hotel Hafnia.

***Aftasta rað f.v.:*** *Marius Thomasen, Regin Thomsen, Kára Jacobsen, Jógvan A. Joensen, Frants Restorff og Árni Jacobsen.*
***Miðraðið f.v.:*** *Alma Brend, Kirstin Rein, Ann Marr, Liljan Rein, Marjun Weihe, Marita Arge Magnussen og Viggo í Stórustovu.*
***Fremst f.v.:*** *Tórhild Petersen, Ása Reinert, Gunna Hansen og Maria Lindberg.*

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 151)

*Myndaeigari: Marita Arge Magnussen*





*Málningur hjá Jack Kampmann frá 1957 (65x95 cm)*

# Framsýning í Listaglugganum

Nýggj framsýning er latin upp í Listaglugganum í Niels Finsensgøta 25 í Havn.

Við á framsýningini eru verk eftir m.a. Ingálvur av Reyni, S. J. Mikines, Ruth Smith, J. Kampmann, H.J. Glerfoss, Waagstein, Bent Restorf, J. Kamban, Frimod Joensen, Poul Horsdal, Zacharias Heinesen, Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni, Bárður Jákupsson, Kára Svensson o.fl. Samanlagt eru 26 listafólk umboðað á framsýningini við umleið 65 verkum.

Framsýningin er opin hesa vikuna og endar leygardagin kl. 14.00. Framsýningin er opin í vanligari upplatingartíð hjá Listaglugganum, sum er vanligar dagar 15.00 – 17.30 og leygardag kl. 11.00 – 14.00.

Fyri 20 árum síðan:

# Motor Óli á fjalli

Í Sosialinum leygardagin 4. mars 1989 er ein lýsing hjá Nýggja Bókhandli í Havn, har Óli P hevur gjørt hesa tekning við Motor Óla, sum




tosar í eina Motorola telefon, meðan hann er á fjalli. Tekningin vísir hvussu stórar tær fyrstu fartelefonirnar vóru.

Motorola er ein amerikonsk fyritøka, sum varð sett á stovn í Chicago í 1928 og byrjaði at framleiða battaríir. Seinni fóru teir undir framleiðslu av radio til bilar, sjónvarp, tráleysar telefonir o.l. Motorola er í dag ein multinational telekommunikationfyritøka við høvuðssæti í Schaumburg í Illinois.

